# Tríggir hálvir og nógv feløg

**Johan Byrial Hansen, Marc Nygaard og Claus Bech Jørgensen royna seg í trimum ymiskum londum, og tað gongst eitt sindur ymiskt hjá teimum. Í løtuni er ein av hesum upp á tal hjá liði í bestu ensku deildini, men hinir báðir hava skift felag fleiri ferðir seinasta árið**

EYÐUN KLAKSTEIN

Nakrir spælarar við føroyskum ættarbondum gera vart við seg í útlendskum fótbóltskappingum.

Tann best kendi av hesum er Johan Byrial Hansen, sum hevur spælt á føroyska landsliðnum átta ferðir síðani 2000. Hann er uppvaksin í Danmark, men er føroyingur og kann tí spæla við okkara landsliðið.

Tað vildi hann fegin, tá ið boð vóru eftir honum, og nú hann hevur verið á føroyska landsliðnum, fangar borðið, og nú kann hann ikki spæla fyri annað land.

Johan Byrial hevur spælt fyri fýra feløg seinsta árið. Hann var verjumaður í 1. deildarfelagnum AC Horsens, áðrenn hann gjørdi sáttmála við superligufelagið OB. Har hevði hann trupult við at býta seg fastan á besta liðnum, og tí varð hann leigaður út til Fredericia, har hann bæði spældi og gjørdi okkurt málið.

Nú er hann farin aftur til AC Horsens at spæla, og her kann hann eisini vænta sær nógva spælitíð.

Johan Byrial Hansen er framvegis upp á tal til føroyska landsliðið, hóast hann í fyrstu fyrstu ikki fekk boð aftur, tá ið Henrik Larsen gjørdist landsliðsvenjari.

### Aftur og fram hjá Nygaard

Marc Nygaard, sum er ein annar av fótbóltsmonnunum við føroyskum ættarbondum, hevur eisini spælt fyri fleiri feløg seinastu tíðina, og tað hevur ikki bara gingið eftir vild hjá honum.

Stóri álopsspælarin kundi spælt á føroyska landsliðnum, men tað kann hann ikki longur. Orsøkin er, at hann hevur spælt nakrar fáar dystir á danska landsliðnum, og so ber ikki til at skifta landsliðsbúnan út.

Fyri nøkrum mánaðum síðani var upp á tal, at Marc Nygaard skuldi gera sáttmála við FC Keypmannahavn, men hetta gjørdist ikki veruleiki.

Orsøkin til at hetta skiftið kom upp á tal var, at sáttmálin millum Nygaard og hollendska felagið Roda, har hann spældi í fimm ár, skuldi ganga út í summar, og tí gjørdist tað aktuelt at skifta felag.

Og tað gjørdi Marc Nygaard, hóast FCK ikki var áhugað í honum, tá ið alt kom til alt. Ístaðin flutti hann til belgiska felagið Lommel, sum gjørdi leigusáttmála við hann í januar mánaði. Men Lommel kláraði ikki at gjalda fyri leiguna, og tí endaði í mars mánaði við, at Marc Nygaard gjørdi leigusáttmála við hollendska felagið Excelsior, har hann nú skal royna at fáa yrkisleiðina sum fótbóltsspælari á rættkjøl aftur.

### Skorar nógv mál

26 ára gamli Claus Bech Jørgensen hevur føroyska mammu, og hann hevur ikki enn spælt nakran landsdyst. Tann ídni miðvallarin við góða máltevinum er eitt heitt navn í Onglandi í hesum døgum.

Hann spælir fyri 1. deildarfelagið Bradford, men har eru fíggjarligu umstøðurnar so vánaligar, at allir 1. liðsspælararnir eru settir til sølu.

Claus Bech Jørgensen fær neyvan trupulleikar við at finna nýtt felag í Onglandi, tí hann hevur spælt serstakliga væl í ár. Hann hevur skotið nógv mál fyri Bradford, og herfyri gjørdi hann mál í seks dystum á rað.

Premier League-felagið Southampton sigst hava víst áhuga fyri Claus, og hetta hevur spælarin eisini sagt seg vita eitthvørt um.

Sáttmálin við Bradford rennur út í summar, og ta er sannlíkt, at fótbóltsframtíðin hjá Claus Bech Jørgensen liggur í øðrum felagi. Í fyrstu syftu vil hann halda fram í enskum fótbólti.

Claus Bech Jørgensen hevur ikki spælt á danska landsliðnum, og hann er heldur ikki innkallaður til føroyska landsliðið. Hann hevur áður sagt, at hann stílar eftir tí danska landsliðnum og tað ætlar hann at gera so leingi, sum tað er ein vón fyri at málið kann náast.

Sum hann hevur spælt seinastu mánaðirnar, hevur hann ongantíð verið nærri einum plássi á danska landsliðnum, og um hann í næstum kann gera sáttmála við felag í bestu ensku deildini, er ikki langur teinur eftir á mál.



*Johan Byrial Hansen spælir nú aftur í Horsens, sum er við í næstbestu donsku deildini.*

Mynd: Álvur Haraldsen






# Christian Høgni er bakkur í Vejle

**Vejle hevur skift venjara, men teir framvegis ilt við at toga seg upp eftir stigatalvuni. Atli Gregersen hevur ilt við at sleppa fram at í Randers**

EYÐUN KLAKSTEIN

Christian Høgni Jacobsen røkir í løtuni plássið sum høgri bakkur í Vejle.

Sigursvanda felagið, sum nú spælir í næstbestu donsku deildini, liggur einki serligt fyri. Teir eru miðskeiðis á stigatalvuni, men tað eru nógv stig, sum skulu vinnast inn, skulu teir koma í nánd av einum uppflytingarplássi.

Vejle flutti í fjør niður úr superliguni, men tað er ikki líkt til, at teir verða aftur í superliguni eftir summarferiuna.

Christian Høgni gjørdi fyri hálvum øðrum ári síðani sáttmála við Vejle, eftir at hann hevði trupult við at sleppa á liðið í Esbjerg.

Síðani hann kom til Vejle hevur hann spælt nógv meira á besta liðnum, og í løtuni tykist hann hava fast pláss í verjuni.

Christian Høgni hevur annars spælt sum áleypari, og hann hevur eisini skorað á føroyska landsliðnum, men onkuntíð hevur hann verið brúktur á miðvøllinum og í høgra borði.

Fyri stuttari tíð síðani fekk venjarin hjá Christian Høgna sekkin. Leiðslan í Vejle hevði mist álitið á Frank Pedersen, og tí er tað nú Henrik Brandenborg, sum stendur við róðrið.

### Atli í Randers

Ein annar føroyskur spælari roynir seg í 1. deildarfelagi í Jútlandi.

Atli Gregersen hevur í fleiri ár spælt fótbólt í Randers. Hann hevur spælt nakað á besta liðnum hjá felagnum, men í løtuni hevur hann ilt við at sleppa fram at.







## Bilpakkar Summarsiglingin 2003

| Tórshavn - Hanstholm ella hinvegin | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lágárstíð** | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað úti. |
| Bilur + 5 fólk | 4.900 | 5.580 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.920 | 4.960 | 5.600 | - | - | 7.120 |
| Bilur + 3 fólk | 3.220 | 4.000 | - | 4.780 | 5.200 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.520 | 3.040 | - | - | - | 4.120 |
| Bilur + 1 fólk | 1.720 | 1.960 | - | - | - | 2.520 |
| **Háárstíð** | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað úti. |
| Bilur + 5 fólk | 6.600 | 7.380 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.280 | 6.560 | 7.520 | - | - | 9.440 |
| Bilur + 3 fólk | 4.340 | 5.300 | - | 6.380 | 6.950 | - |
| Bilur + 2 fólk | 3.380 | 4.020 | - | - | - | 5.460 |
| Bilur + 1 fólk | 2.300 | 2.620 | - | - | - | 3.360 |

| Tórshavn - Bergen ella hinvegin | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lágárstíð** | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað úti. |
| Bilur + 5 fólk | 3.600 | 4.400 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.880 | 3.520 | 4.000 | - | - | 4.800 |
| Bilur + 3 fólk | 2.320 | 2.800 | - | 3.280 | 3.520 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.760 | 2.080 | - | - | - | 2.720 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.320 | - | - | - | 2.000 |
| **Háárstíð** | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað úti. |
| Bilur + 5 fólk | 4.600 | 5.800 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.680 | 4.640 | 5.280 | - | - | 6.240 |
| Bilur + 3 fólk | 3.000 | 3.720 | - | 4.320 | 4.800 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.280 | 2.760 | - | - | - | 3.560 |
| Bilur + 1 fólk | 1.520 | 1.760 | - | - | - | 2.160 |

| Tórshavn - Lerwick ella hinvegin | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lágárstíð** | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað úti. |
| Bilur + 5 fólk | 2.500 | 3.100 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.000 | 2.480 | 2.880 | - | - | 3.520 |
| Bilur + 3 fólk | 1.640 | 2.000 | - | 2.420 | 2.660 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.280 | 1.520 | - | - | - | 2.040 |
| Bilur + 1 fólk | 880 | 1.000 | - | - | - | 1.260 |
| **Háárstíð** | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað úti. |
| Bilur + 5 fólk | 3.300 | 4.200 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.640 | 3.360 | 3.760 | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 2.180 | 2.720 | - | 3.200 | 3.500 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.700 | 2.060 | - | - | - | 2.700 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.340 | - | - | - | 1.680 |

| Tórshavn - Seyðisfjørður ella hinvegin | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lágárstíð** | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað úti. |
| Bilur + 5 fólk | 4.200 | 5.000 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.360 | 4.000 | 4.560 | - | - | 5.760 |
| Bilur + 3 fólk | 2.740 | 3.220 | - | 3.880 | 4.240 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.100 | 2.420 | - | - | - | 3.300 |
| Bilur + 1 fólk | 1.400 | 1.560 | - | - | - | 2.000 |
| **Háárstíð** | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað úti. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað úti. |
| Bilur + 5 fólk | 5.700 | 6.600 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.560 | 5.280 | 6.080 | - | - | 7.680 |
| Bilur + 3 fólk | 3.700 | 4.240 | - | 5.140 | 5.620 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.840 | 3.200 | - | - | - | 4.400 |
| Bilur + 1 fólk | 1.880 | 2.040 | - | - | - | 2.680 |

Treytin fyri omanfyrinevndu bilpakkum er at ferðin byrjar og endar í Føroyum.

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo